# Nú verður hugaligari at verða gamal í Føroyum

**Um alt landið er kapping um at sleppa at byggja ellis- og røktarheim og gongur sum ætlað, verður tørvurin nøktaður nógvastaðni um nøkur fá ár**

ELDRAPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Í Eysturoy, ar lítil og ongin tørvur er á fleiri plássum, er eisini gravgangur eftir at sleppa at byggja ellis- og røktarheim. Hinvegin hava Suðuroyingar og norðoyingar ikki enn søkt um nakað stórvegis, hóast tørvurin í teimum báðum økjunum er rættiliga stórur*

Nú verður hugaligari at verða gamal í Føroyum.

Í øllum førum kann staðfestast, at kommunur um alt landið eru farin at kýta seg av lívsins kreftum fyri at bøta um korini hjá teimum gomlu.

Ein týðandi partur av eldrapolitikkinum, hevur verið at byggja ellis- og røktarheim, men tað er eitt økið, sum hevur verið skammiliga forsømt og tað eru javnan neyðarróp at hoyra frá eldri og avvarðandi um, hvussu illa stendur til við røktarheimsplássum til eldri.

Men nú er vend við at koma í – og tað av álvara.

Nú er at kalla kapping um at sleppa at byggja ellis- og røktarheim og um alt landið koma umsóknir til Almanna- og heilsumálaráðið um stuðul til at byggja ellis- og røktarheim fyri.

Kristjan Árnason, fulltrúi, sigur, at tilsamans hevur Almanna- og heilsumálaráðið fingið 13 umsóknir frá kommunum úr øllum landinum.

Løgtingið hevur samtykt, at tey næstu trý árini, til og við 2008, kann landskassin lata tilsamans 51 milliónir krónur í stuðuli til ellis- og røktarheim og onnur stovnspláss til eldri. Kommunur, sum ætla sær undir byggingar, kunnu so søkja um at fáa stuðul úr hesari puljuni.

Men tær kommunur, sum vilja sleppa upp í part, skulu skunda sær. Seinasta freist at søkja um stuðul er 31. januar, og væntandi fara onkrar umsóknir at koma afturat teimum 13, sum longu eru komnar.

Talan er í høvuðsheitum um umsóknir um stuðul til at byggja røktarheim fyri.

Ongar umsóknir eru viðgjørdar og enn minni avgreiddar enn, tí tað verða tær ikki, fyrrenn umsóknarfreistin er úti og allar umsóknirnar komnar inn

– Tá verða umsóknar játtaðar alt eftir, hvussu stórur tørvurin er í teimum ymsu økjunum, sum hava søkt. Tey økini, har tørvurin er størstur, fáa fyrst játtan og so verður býtt sundur eftir tí, til puljan er uppi.

Allar umsóknir, sum eru komnar inn, eru sendar til heimarøktina til ummælis fyri eisini at fáa eina fakliga meting av, hvussu tørvurin er í teimum ymsu økjunum.

Og Kristian Árnason metir, at tá ið umsóknirnar eru so nógvar í tali, at tá ið tær eru avgreiddar, verður stuðulin eisini uppi.

Annars vísti tann seinasta tørvskanningin hjá Almanna- og heilsumálaráðnum, at í øllum landinum tørvur er á 151 búplássum á ellis- og røktarheimum, sambýlum og heimum til minnisveik

Men tað er ógvuliga stórur munur á, hvussu stórur tørvurin er í teimum ymsu økjunum.

– Tað er serliga í trimum økjum, at tørvurin er stórur og tað er fyrst og fremst í Suðurstreymoy, men eisini í Suðuroy og í Norðoyggjum er rættiliga stórur tørvur, sigur Kristian Árnason.

Tilsamans fevna tær 13 umsóknirnar, sum eru komnar um 187 búpláss.

Men hetta merkir ikki, at tørvurin verður væl og virðiliga nøktaður, hóast allar umsóknirnar verða gingnar á møti. Sum tað sæst í yvirlitinum, eru fýra umsóknir úr Eysturoy, har tørvurin er rættiliga væl nøktaður frammanundan. Hinvegin er bara ein umsókn úr Norðoyggjum um eitt sambýli í Svínoy til 8 fólk, hóast tørvurin í økinum annars er rættiliga stórur og úr Suðuroy er somuleiðis bara ein umsókn um at byggja 10 pláss afturat sambýlinum í Vági, hóast kanningin vísir, at tørvurin er nógv størri enn so.

## Tørvur á 151 plássum

**Seinasta tørvskanningin hjá Almanna- og heilsumálaráðnum vísir, at í øllum landinum er tørvur búplássum til 151 fólk á ellis og røktarheimum, sambýlum og á serligum heimum fyri minnisveik.**

Tørvurin er hesin.

| Øki | Tørvur | Umsóknir |
|---|---|---|
| Suðurstreymoy | 68 pláss | 84 pláss |
| Suðuroy | 33 pláss | 10 pláss |
| Norðoyggjar | 27 pláss | 8 pláss |
| Vágar og Norðurstreymoy | 20 pláss | 39 pláss |
| Sandoy | 4 pláss | 0 pláss |
| Eysturoy | 0 pláss | 46 pláss |

Í hesum tølunum er allur tørvurin taldur við, tvs, bæði ellis- og røktarheim, pláss til minnisveik o.s.fr.

Skulu tølini býtast sundur, er tørvur á 91 ellis- og røktarheimsplássum um alt landið og tað er tørvur á 38 plássum til minnisveik og tað er tørvur á sambýlum til 22 fólk.

Viðvíkjandi Eysturoy kann viðmerkjast, at hóast tørvurin sum heild er nøktaður, verður mett, at tørvur er á sambýlum til 8 fólk, eins og eitt fólk hevur tørv á at sleppa á heim fyri minnisveik. Hinvegin leypa 10 pláss av á ellis- og røktarheimum í Eysturoy og tí verður sagt, at samlaði tørvurin er nøktaður.

Verður gjørt upp í prosentum, hvussu stórur partur av tørvinum, er nøktaður í teimum ymsu økjunum, sæst, at í Suðuroy eru 63% av tørvinum nøktaður, Næstringast fyri er Suðurstreymoy, har bara 65% av tørvinum er nøktaður. Í Norðoyggjunum eru 73% av tørvinum nøktaður og Í Vágum og Norðurstreymoy eru 83% av tørvinum nøktaður. Í Sandoy er 86% av tørvinum nøktaður, men í Eysturoy eru 100% nøktað.

## Hava fingið 13 umsóknir

Higartil hevur Almanna- og heilsumálaráðið fingið 13 umsóknir um stuðul til at byggja ellis- og røktarheim. Og sum tað sæst í yvirlitinum niðanfyri, eru tað flestu øki í landinum, sum ætla sær at byggja stovnspláss til eldru.

Umsóknirnar eru hesar:

| Øki | Umsóknir | Búpláss |
|---|---|---|
| Suðurstreym | 4 | 84 |
| Norðurstreym og Vágar | 3 | 39 |
| Eysturoy | 4 | 46 |
| Norðoyggjar | 1 | 8 |
| Suðuroy | 1 | 10 |
| Tilsamans | 13 | 187 |

Úr Suðurstreymoy er ætlanin at útvega pláss til heili 84 fólk.

Ætlanin er at byggja eitt ellis- og røktarheim í Kirkjubø til 10 fólk. Í Mattalág hevur kommunan keypt eini hús, har ætlanin eisini er at gera pláss til 10 fólk. Við Tjarnargarð er ætlanin at byggja ellis og røktarheim til 24 fólk og á Boðaneshamri hevur kommunan útvegað sær stykki, har ætlanin er at byggja Ellis og Røktarheim til 40 fólk.

Úr Norðstreymoy og Vágum eru umsóknir um stuðul til búpláss til 39 fólk.

Í Norðstreymoy er søkt um stuðul til at byggja 13 pláss upp í Ellis- og røtkarheimið í Vágum. Vestmanna Kommuna hevur somuleiðis søkt um stuðul til at byggja ellis- og røktarheim til 20 fólk og Sjómanskvinnuringurin í Vestmanna hevur søkt um stuðul til eitt sambýli til 6 fólk.

Úr Eysturoy eru umsóknir um stuðul til 46 búpláss.

Í Eysturoy søkti Skála Kommuna í síni tíð um stuðul til at byggja til 8 fólk upp í eldrasambýlið á Skála.

Í Eysturoy er eisini ein gomul umsókn frá Gøtu Kommunu um stuðul til at byggja uppí sambýlið til seks fólk afturat. Tann útbyggingin er gjørd, men stuðulin er ongantíð játtaður og tí liggur tann umsóknin enn.

Annars hevur Sjóvar Kommuna søkt um stuðul til at byggja eldrasambýli til 12 fólk

Harafturat er ein gomul umsókn frá Fuglafjarðar Kommunu, har ætlanin er at byggja eitt ellis- og røktarheim til 20 fólk.

Úr Norðoyggjum er umsókn komin frá Svínoyar kommunu um stuðul til at byggja eldrasambýli til 8 fólk.

Í Suðuroy hevur Vágs Kommuna søkt um stuðul til at eldrasambýlið í Vági við 10 plássum.

Talan er um eina eldri umsókn. Men sum kunnugt arbeiða royna kommunur í Suðuroy nú at fremja eina nýggja ætlan um at byggja eitt rættiligt ellis- og røktarheim í Vági.

Enn er hevur Almanna- og heilsumálaráðið kortini onga umsókn fingið úr Suðuroy um ellis- og røktarheim og Kristian Árnason, fulltrúi sigur, at so leingi ráðið onki fréttir aftur úr Suðuroy, verður hendan umsóknin um at útbyggja eldrasambýlið í Vági, viðgjørd sum allar